

Jóhannes Miðskarð, PhD innan læring, leiðslu og arbeiðsorganisering

# Samskapan, har tað menniskjasliga er í fokus

Ofta verður tosað um, at borgarar skulu hava eina hurð til almennu skipaninar og um, at borgarar ikki mugu detta niður ímillum tveir stólar. Her verður víst á, at okkara vælferðartænastur søguliga eru mentar í ymsum geirum: ein almennageiri, ein undirvísingar-geiri, ein heilsugeiri o.s.fr. Og tá ið ein borgari kemur í samansettar avbjóðingar, má viðkomandi ferðast ímillum fleiri ymsar tænastur frá ymsum geirum, sum ikki virka eftir sama leisti.

Tað er einki forgjørt í, at vit hava ymsar geirar. Í nærum 60 ár eru hesir geirar mentir hvør sær, og eg haldi, at tað hevur verið neyðugt at ment teir hvør sær til tess at geva geirunum loyvi at spesialisera seg júst til teirra uppgávu.

Men nú eru allir geirarnir mentir so at siga til fulnar, og nú er tíðin eisini komin veruliga at samstarva tvørtur um geirar.

Nøkur siga nú, at vit mugu bróta geirahugsan niður og gera ein felags



geira fyri allar almennar tænastur, haldi eg, er ein vandaleið. Eins og eg virki fyri at professiónirnar skulu varðveita síni sereyðkennir, og vit ikki skulu fáa eina felagsprofessión.

Onnur siga, at vit skulu tosa um, hvat hoyrir heima í hvørjum geira, og vit skulu tosa um, hvørjar uppgávur/tænastur ikki hoyra heima í einum ávísum geira. Í Føroyum hoyri eg, at tað verður ofta tosað um *markamót*. Men tá ið almennir geirar fara at tosa um mørk, verður fokus av sær sjálvum varpað á uppgávuloysn – altso, hvør skal loysa hvørjar uppgávur á einum øki.

Í ástøði til slíkt uppgávubýti verður hugtakið *social closure* brúkt, tá ið fokus verður sett á at seta mørk um uppgávur. Hugtakið *social closure* merkir, at ein profession ella stovnur læsir nakrar uppgávur inni og nakrar uppgávur úti. Hetta virkar tveir vegir, professiónin ella stovnurin vil ikki loysa uppgávurnar, ið liggja uttanfyri teirra øki, og ei heldur vilja tey lova øðrum professiónum ella stovnum inn á teirra øki.

Mær hóvar ikki orðasamansetinga markamót, tí orðið *mark* er ov sentralt. Eg veit væl, at fokus verður kastað á gráøkið millum mørkini altso *mótið*. Men tó verður sett sum fyritreyt, at mørkini eru týdningarmikil.

Í øðrum londum verður hinvegin nú á døgum heldur tosað um *samskapan*, tá ið vit tosa um tað, sum liggur ímillum geirar. Í stuttum merkir tað, at tveir ella fleiri geirar samskapa eina brúgv millum tveir geirar. Hesar brýr verða bygdar við kreativiteti, meining, smáum skjótum fetum, borgaraluttøku sum byggisteinar.

Enn einferð má eg undirstrika, at eg grundleggjandi haldi, at geirabýtið er ein krumtappur í okkara vælferðarsamfelag, og at tað er gott. Og at vit tí ikki mugu *blaka barnið út við baðivatninum*.

Men hvussu gera vit við teir borgarar, ið mugu ferðast ímillum geirar? Tað eru her brýr skulu byggjast. Men tó mugu vit ikki bara fokusera á sjálva brúnna, men á fólkini, ið skulu ferðast á brúnum ímillum geirarnar. Tað er jú eingin sjálvfylgja, at fólkini eru í fokus, tí tað er torført at byggja brýr – serliga millum ymsar geirar.

Politiski ástøðingurin, Hannah Arendt, hevur gjørt okkum varug við, at í okkara samfelagsskipan er áhaldandi vandi fyri, at menniskjað hvørvur. Hon argumenterar, at í tí samfelagsformi, ið kom fram eftir miðøldina, og sum vit enn hava, liggur ein innbygd fremmandagerð av menniskjanum. Loysnin hjá Hannah Arendt er, at vit stremba eftir at seta tað menniskjansliga fremst og ikki skipanir og ideologiir.

Eg havi sjálvur kannað og undirvíst í tvørprofessionellum og tvørgeiraligum samstarvi, sum eisini eru nakrir av grundarsteinunum, tá ið brýr skulu byggjast. Natúrliga verður ofta fokuserað upp á, hvat professiónirnar hava av serførleika og síðani, hvussu hesin serførleiki hóskar saman í einum samstarvi. Hetta er eitt samansett øki, og tí havi eg fleiri ferðir eygleitt, at fokusið verður verandi á professiónunum, og sjálvur borgarin fer í bakgrundina, tá ið tvørprofessionellar samstarvsbrýr verða bygdar.

Ein typiskur netverksfundur er ofta ov eyðkendur av, at hvør professión skal forklára avbjóðingar hjá einum borgara frá sínum sjónarhorni. Og tá verður borgarin ofta gloymdur ella kemur langt aftur í røðina at fáa sítt pláss. Her mugu tey professionellu minnast til, at hjá borgaranum er støðan ofta avbjóðandi. Tí eiga slíkir fundir eisini at geva tíð til steðgir og eftirhugsan soleiðis, at professionellu vinklarnir ikki buldra fram og møguliga stoyta saman. Tá verður møguliga eitt orðaskiftið um, hvør nú eigur hvørjar uppgávur, veruleiki.

Tað er ikki bara neyðugt at seta borgaran í miðdepil í tvørprofessionellum og tvørgeiraligum samstarvi. Tey professionellu mugu eisini minnast til, at hóast tey hava útbúgving sum t.d. sálarfrøðingur, lærari ella fysioterapeutur, so eru tey fyrst og fremst menniskju eins og borgarin. Tað vil siga, at tá ið tey hitta hvønnannan, má tann menniskjansligi parturin vera við.

Í 1975 fekk Hannah Arendt *Sonning* heiðurslønina á Keypmannahavnar universiteti. Í takkartaluni kemur Hannah Arendt inn á okkara arbeiðssamleika og okkara persónliga samleika. Hon leggur dent á, at tað altíð er eitt menniskja aftanfyri ein fakligan leiklut. Og tí heldur hon eitt nú, at ein lækni skal ikki bara allýsa seg sum lækna. Hann er eitt menniskja, har ein av mongu lívsleiklutunum er, at hann er lækni.

Í hesum sambandi vísir Hannah Arendt á, at vit kunnu samanbera okkara fakkunnleika við eina rómverska grímu, sum tær vóru fyri yvir 2000 árum síðan. Hesar grímur vóru soleiðis gjørdar, at opini til munn og eygu vóru serliga stór soleiðis, at tá ið tú sást ein persón spæla ein leiklut, so hómaði tú altíð sjálvt menniskjað, ið spældi leiklutin, týðiliga og ikki bara leiklutin.

Arendt tekur dømið, at ein lækni bara er ein lækni í sjálvari arbeiðsuppgávuni og ikki í øllum øðrum pallum í hennara ella hansara lívi. Til dømis borðreiðir ein lækni vanliga ikki við mati til sjúklingar, tá ið sjúkragongd er, men so skjótt læknin heldur ein fund á skrivstovuni ella hevur gestir heima, er einki til hindurs fyri, at hann borðreiðir mat fyri øðrum. Hetta, heldur Arendt, vísir, at okkara fakkunnleiki er avmarkaður til nøkur støð ella støður, og at tað altíð er eitt menniskja aftanfyri fakliga leiklutin.

Tað er júst hetta *menniskjað*, sum eg haldi, dentur skal leggjast á. Hetta fyri at økið ímillum professiónir, stovnar ella geirar ikki gerst eitt markastríð, men heldur eitt samskapanarøkið, har borgarin og tey avvarðandi, og ofta spenta støða teirra, er í fokus. Júst við at ymsu fakpersónarnir sýna sín menniskjaleika fyri hvørjum øðrum, verða teir og borgarin javnsettir.

Júst hetta, at tey professionellu skulu hava sín menniskjaleika við, havi eg út frá ástøðini hjá Hannah Arendt arbeitt nógv við. Í míni nýggju bók *Teachers Meet Social Workers* havi eg tikið støði í, at Hannah Arendt heldur, at vit sum menniskju í grundini bara hava seks sløg av høvuðsvirksemi, sum vit útinna: 1) endurtakandi uppgávur 2) verkætlanararbeiði 3) hugbirting 4) eftirhugsan 5) at fólk áseta ein felags vilja 6) at tann einstaki eftirmetir saman við øðrum. Í bókini havi eg fokus á, hvussu samstarv er í hvørjum virksemi, og serliga havi eg fokus á tvørprofessionelt samstarv.

Við *endurtakandi uppgávum* meinast við virksemi, sum øll menniskju mugu gera fyri dagliga at halda likamið virkið, t.d. matgerð og reingerð. Lykilin til samstarv í hesum virksemi er, at fólkini gera seg eins og hini og virka sum eitt samlað likam.

Í *verkætlanararbeiði* hevur hvør professionellur sínar serførleikar, og júst teir ymsu serførleikarnir gera, at tað er møguligt saman at loysa samansettar uppgávur. Uppgávur, sum ein einstakur ikki megnar at loysa sjálvur.

Tá ið vit koma til triðja virksemið, sum er hugbirting, eru tey einstøku fakfólkini ávikavist

» eins og nøkur onnur (t.d. professiónir og kyn),

» eins og øll onnur (altso, eingin munur á nøkrum menniskjum yvirhøvur),

» og tann einstaki er haraftrat ikki eins og nakrar annar (unikkur).

Um t.d. ein lærari og ein sosialráðgevi møtast í eini hugbirting á omanfyri nevndu trimum løgunum, er úrslitið, at tey gerast klókari uppá, hvussu ein annar hugsar, og hervið víðka tey sín egna hugsarnarhátt. Tó er avgerandi, at tann einstaki altíð vendir aftur til sín sjálvs eftir hugbirtingina - tó eitt sindur klókari. Ein hugbirting er krevjandi fyri tann einstaka, og tí er neyðugt eftir hugbirtingarnar, at tann einstaki fær tíð til eftirhugsan.

*Eftirhugsan* er tí virksemið, sum verður framt í einsemi, men tó bara eftir, at tað einstaka menniskjað hevur samskifti við onnur menniskju



um nakað, sum onnur menniskju hava avrikað. Onnur hugsan er ikki eftirhugsan sambært Arendt, men resonnering.

Eftir at fólk hava verið í hugbirting og hava havt tíð til eftirhugsan, er tíðin komin til felags átøk. Her kemur virksemið, *her menniskju áseta sær ein felags vilja*. Altso, tey skulu samtykkja aðalreglar og fylgja teimum. Hetta er nakað, sum er torført hjá okkum, tí vit eru so ymisk. Tí sigur Arendt, at tað er týdingarmikið, at vit kunnu fyrigeva hvørjum øðrum, tá ið vit gera feilir, og at vit síðani geva hvørjum øðrum nýggj lyftir.

Tá menniskju hava gjørt felags viljar ella verið í somu uppliving, er týdningarmikið, at tann einstaki *eftirmetir* og torir at taka støðu til okkurt, hann ella hon hevur upplivað. Slíkar eftirmetingar skulu gerast, meðan vit eru saman við øðrum. Vit skulu halda nokk so fast í egnari døming, heldur Hannah Arendt, men samstundis skulu vit í dømingini læra at hátíðarhalda, at onnur fella aðrar dómar.

Við hesum seks samstarvsformum havi eg kannað tvørprofessionelt samstarv í Onglandi og í Danmark. Í Onglandi valdaði *verkætlanarsamstarv* í tí tvørprofessionella samstarvinum. Meðan í Danmark fann eg fleiri *hugbirtingar*. Sjálvt um hugbirting er djúpri, so skal verkætlanarsamstarv avgjørt eisini nýtast. Men tað er tó ikki gott, um yvirvágin í tvørprofessionellum samstarvi er verkætlanararbeiði, sum eg eygleiddi í Onglandi.

Tíverri má eg siga, at eg tey seinnu árini bæði í Danmark og í Føroyum havi sæð meira og meira av verkætlanarsamstarvi í tvørprofessionellum samstarvi. Verkætlanarsamstarv er ofta eyðkent av, at arbeiðshættir og amboð koma í fokus, hetta við at tørvur hjá borgarum verður máldur í talvum, ið fáa ymsk stig soleiðis, at tað er lættari hjá teimum professionellu at samskifta og at taka avgerðir. Men her missa vit heildarmyndina av avbjóðingunum hjá borgarunum.

Tí mugu vit ikki ov ofta gera *hugbirting* um til *verkætlanarsamstarv*. Men tað er tó heldur ikki so, at hugbirting er vandaleys. Tað, sum kann henda við hugbirting, er, at fólk royna at laga seg eftir felagshugsan og ikki tosa út frá, at tey samstundis eru ávikavist eins og nøkur onnur, eins og øll onnur, og at tann einstaki ikki er eins og nakar annar.

Ein annar vandi júst við slíkum samansettum fokusi (við nøkrum, øll og eingin annar) ber í sær, at støðan hjá borgaranum fjarar út í tí tvørprofessionellu samskaptu brúnni. Her haldi eg, at tað er týdningarmikið, at tey professionellu í einum tvørprofessionellum samstarvi altíð hava beinleiðis útsagnir (orð, kenslur ella annað samskifti) hjá borgarnum sum snúningarása í sínum samstarvi.

At enda kann eg taka saman um við at siga, at eg haldi, at vit ikki skulu tosa ov nógv um mørk, men heldur tosa um, hvussu sjálvstøðugir geirar kunnu gera tað møguligt, at menniskju kunnu ganga um brýr ímillum geirarnar. Hetta gera vit við at hava borgaran í fokus og hoyra hennara ella hansara rødd. Og við at tey ymsu professionellu ikki fella í at gera alt sítt samstarv til ásettar, ofta stívar arbeiðshættir, men at vit heldur samskifta sum menniskju, har vit eru áhugað í at avlesa, hvussu onnur síggja eina samansetta avbjóðing øðrvísi enn vit sjálvi.

Tá er tað sum at fara at ferðast. Tí tá ið vit fara at ferðast, mugu vit leggja alt tað heimliga aftur um okkum fyri at fáa sum mest burturúr lærdómi í tí nýggja landinum. Men tó, so mugu vit fara heimaftur eftir ferðina til egnan bústað og ikki t.d. tosa franskt, men heldur vera jarðsett við málinum í landinum, har vit liva. Broytingin liggur heldur í, at nú eru vit heimaborgarar, ið hugsa eitt sindur víðari enn tey, sum altíð valdu at verða verandi heima.